Ítróttar
# Sosialurin

Nr. 112 • mikudagur • 14. juni 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Vinnarin verður eittari

**Talan er um rættiligt oddabrak, tá HB og GÍ skulu kappst við HM-endaspælið um áskoðarar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við at leggja dystin klokkan 18, munnu tey í HB tó hava lagt sær HM-skránna í geyma. Í øllum førum man tað á pappírinum vera léttari at kappast við Tunis og Saudi Arabia um áskoðarar, heldur enn við Týskland og Póland.



*Tá liðini bæði spældu í Gøtu fyrr í ár, vann GÍ 3-2, og tað er uttan iva eitt tap, sum tey í HB nú vilja hevna*

### Leikbann órógva

Hjá spælarunum á liðunum báðum er tó lítil ivi um, at tað er í Gundadali, at tankarnir skulu savnast. Sum stigatalvan sær út, nú 12 umfør eru spæld, er HB á odda, meðan GÍ á triða plássinum er bara eitt stig aftanfyri. Tí stendur longu greitt, at vinnarin av dystinum í kvøld sleppur at rópa seg oddalilð, og tað er ein heiður, sum báðir partar heldur enn gjarna vilja hava.

Hjá HB verður talan eftir øllum at døma um onkrar taktiskar broytingar á liðnum. Enn eru Jákup á Borg og Bárður Johannesen úti við skaða, og hartil er Vagnur M. Mortensen leikbannaður, eftir at hann fekk reytt kort seinasta sunnudag. Hartil kann roknast við, at miðvøllurin enn einaferð verður umskipaður, og serliga upplagt er, at Kári Nielsen aftur verður sentralur á defensiva partinum, eins og Rókur av Fløtum Jespersen ivaleyst vil sleppa at prógva sítt virði fyri liðið.

Hjá GÍ er púra vist, at Hanus Jacobsen ikki er tøkur. Hann fekk reytt kort í dystinum móti ÍF og er tí leikbannaður. Í aðrar mátar tykjast allir mans vera tøkir hjá GÍ.

### Hagtølini

Ofta verður hugt eftir, hvussu liðini vanliga standa seg, tá metast skal um dystir, og í so máta er eingin ivi um, at HB eru favorittar í kvøld.

Seinastu fimtan árini er tað bara einaferð komið fyri, at GÍ hevur tikið stigini í Gundadali. Í 2001 vann GÍ 3-2, og í aðrar mátar hava gøtumenn fimm ferðir fingið javnleik hetta tíðarskeiðið. Restina av dystunum hevur HB vunnið, og tað vil alt annað líka geva teimum eina eyka sálarliga yvirvág. Men hvat hendan so er verd í sjálvum dystinum, ber illa til at staðfesta, fyrr enn um hálvgum átta tíðina í kvøld.

## Formula-liðið




Sosialurin mannar eftir hvørt umfar Formula-liðið. Liðið fyri 12. umfar av Formula-deildini sær soleiðis út

## FINNIÐ BÓLTIN

Saman við Atlantic Airways lutar Sosialurin í ár ikki færri enn 13 flogferðaseðlar á rutunetinum hjá Atlantic. Ein vinnari verður hvørt umfarið í Formula-deildini

Møguleikarnir fyri flogferðum úr Føroyum hava ongan tíð verið so stórir, sum teir verða tað í ár. Við fimm flogførum í støðugari flúgving eigur Atlantic Airways sín stóra lut í øktu valmøguleikunum, og nú kanst tú saman við Sosialinum og Atlantic verða partur í nøkrum av mongu fráferðunum.

Eftir hvørt umfarið í Formula-deildini verður ein mynd at síggja her í blaðnum, har vit hava »sletta« bóltin úr myndini. Uppgávan hjá lesaranum er so at gita, hvar hesin bólturin eigur at vera.

Við at senda SMS-boð á 1441 ber til hjá lesarunum at vera við í kappingini, har Atlantic Airways hevur eina flogferð tøka eftir annaðhvørt av teimum 27 umførunum í Formula-deildini.

Heldur tú, at bólturin er í teigi 1, skal teksturin í SMS-boðnum vera »hvar 1«. Soleiðis skal hvørt boðið bara innihalda orðið »hvar« og so nummarið á teiginum, har tú heldur bólturin eigur at vera.

*Kostnaðurin fyri at senda boðini er 5 krónur umframt vanligan SMS-takst.*

ATLANTIC AIRWAYS






**Hvar er bólturin?**

Hvar heldur tú, at bólturin er? Við at senda eini SMS-boð til 1441 kanst tú vera við í lutakastinum um eina ferð á rutunetinum hjá Atlantic Airways. Skrivað hvar og so nummarið á teiginum, har tú heldur bóltin vera.